# Ein vælnøgd Petsi

**Sjálvt um hon ikki vann, so var Petsi Tvørfoss væl nøgd aftaná Melodi Grand Prix leygarkvøldið**

MELODI GRAND PRIX
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

**Atletion, Århus:** Tá síðsta bríkslið hevði ljóðað í Atletion leygarkvøldið kundu tónleikararnir aftur anda léttan. Yvirstaðið!

Petsi Tvørfoss, sum var føroyska umboðið, um ein so kann siga, hesuferð, stóð seg manniliga og smæddist ikki burturmillum hini. Við einum grand prix klassikara megnaði hon eisini at koma í finaluna, og sangurin verður uttan iva nógv at hoyra í næstu framtíð.

– Eg eri ótrúliga væl nøgd. Aftaná eg hevði hoyrt hinar sangirnar, so hevði eg als ikki væntað at komið í finaluna, segði Petsi aftaná framførsluna.

Fyrstu ferð hon hoyrdi hinar sangirnar var fríggjadagin, og so sjálvandi eisini til aðalroyndina leygardagin, so unga gøtugentan hevði ikki sett nøsina ov høgt upp.

– Eg fekk eitt risa upplivilsi burturúr, og eg eri glað fyri, at eg var við, sigur Petsi, sum er bilsin av, hvussu høgt støðið var í ár.

– Har var ongin sangur, har tú hugsaði, at hesin ikki var nóg góður, sigur hon.

Hvørt nýggja føroyska songstjørnan verður aftur at síggja í Melodi Grand Prix høpi, er ilt at siga.

-– Um tað er ein ordiligur sangur, so kann tað væl vera.

Hvussu verður við framtíðini, veit Petsi enn ikki. Men um ein skal taka øll tey rósandi orðini fyri fult, so hevur Melodi Grand Prix møguliga latið eina dyr ella tvær á glopp.

Jákup Mórits Olsen:

# Fylgt við síðani 1987

**Ein av teimum heilt stóru Grand Prix fjepparunum, Jákup Mórits Olsen úr Klaksvík, var leygarkvøldið mitt í meldrinum, tá Petsi og tey fóru á pallin í Atletion. Hann hevur fylgt væl við danska Melodi Grand Prixnum síðani 1987**

MELODI GRAND PRIX
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*Jákup Mórits Olsen úr Klaksvík var komin úr Aalborg til Atletion í Århus at hoyra Petsi og tey framføra leygarkvøldið. Sjálvur má hann sigast vera ein stórur Melodi Grand Prix fjeppari*
*Mynd: Nicolai Højland Lorenzen*

**Atletion, Århus:** Tað vóru ikki bert ommur og mostrar, sum vóru komnar at heppa Petsi leygarkvøldið. Millum teir 4000 áskoðararnar var eisini Jákup Mórits Olsen úr Klaksvík.

- Eg havi fylgt við Melodi Grand Prix síðani 1987, so nú tá búgvi eg í Danmark, so eg helt, at tað var upplagt at fara at lurta, segði Jákup Mórits undan framførsluni leygarkvøldið. Hann og ein vinmaður vóru komnir úr Aalborg niður til Århus at fylgja við. Og hann fór heldur ikki ósæddur framvið. Við sær hevði hann nevniliga eitt stórt føroyskt flagg.

Hetta er heldur ikki fyrsta ferðin, at hann er við sum áhoyrari til Melodi Grand Prix.

– Eg var eisini og lurtaði tá tað var í Globen, og so í Parkini fyri nøkrum árum síðani.

Sjálvt um atgongumerkini vórðu rivin vekk eftir stuttari tíð, so eydnaðist tað honum at ogna sær atgongumerkið til stóra brakið leygarkvøldið.

Peter Qvortrup Geisling:

# Verið errin av Petsi

**- Petsi fara vit at hoyra nógv meira til, segði ein avgjørdur lækni, Peter Qvortrup Geisling, sum júst hevur verið á Føroyavitjan**

MELODI GRAND PRIX
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*Peter Qvortrup Geisling ivast ikki í, at Petsi verður nógv at hoyra í framtíðini*
*Mynd: Nicolai Højland Lorenzen*

**Atletion, Århus:** Nógv kend fólk høvdu leitað sær til Melodi Grand Prixið í Århus leygarkvøldið. Peter Qvortrup Geisling frá »Læknin hevur orðið« var teirra millum. Til Melodi Grand Prix í 2002 presenteraði hann eisini sangin hjá Malene Mortensen, sum endaði á fyrsta plássinum hetta árið.

- Petsi sang ein avbera góðan sang, og hon stóð seg ógvuliga væl, segði Peter Qvortrup Geisling aftaná showið leygarkvøldið.

Hann leggur afturat, at tað var gott, at Føroyar á hendan hátt vórðu umboðaðar, og at føroyingar hava alla orsøk til at vera ernir av Petsi.

– Har var ongin ivi í, at hon átti eitt pláss í finaluni, men sangur nummar 10 var eisini ringur at vinna á. Áhoyrararnir vóru jú garvillir.

Men kendi sjónvarpslæknin er ikki í iva.

– Petsi fara vit at koyra nógv meira til í framtíðini!





*Øll reisa og síggja út sum um, at tey dáma sangin. Tað var ein ótrúliga góð kensla at standa á pallinum, sigur Tomas Thordarson.*
*Mynd: Nicolai Lorenzen*

# Størri enn orð

**Tomas Thordarson kundi ikki seta orð á, hvussu glaður hann var fyri at vinna Melodi Grand Prix, og hvønn týdning hetta hevur fyri hann**

GRAND PRIX
*Heri á Rógvi*

– Eg havi ongantíð upplivað nakað líkandi.

Nýklakti vinnarin av Melodi Grand Prix 2004 var púra ovfarin, tá hann møtti umboðum fyri fjølmiðlarnar, eftir at Melodi Grand Prix var farið av skýggjanum.

Áhoyrarnir vóru longu til aðalroyndina garvill eftir sanginum hjá Tomas. Og undirtøkan bara vaks, tá Atletion var fullsett og hyggjararnir kring um í kongaríkinum kundi fylgja við. Upptraðkanin hjá Tomas Thordarson var í serflokki tann besta í Atletion leygarkvøldið.

– Øll reisa og síggja út sum um, at tey dáma sangin. Tað var ein ótrúliga góð kensla at standa á pallinum, sigur Tomas Thordarson.

Hann hevði trupult at seta orð, hvussu glaður hann var fyri sigurin, og hvønn týdning sigurin hevur fyri hann.

– Hetta merkir alt fyri meg, var stutta svarið, vit fingu frá Tomas Thordarson.

Nýklakti Grand Prix vinnarin gjørdist kendur í Danmark, tá hann í 2001 endaði á einum triðja plássi í sangkappingini Stjerne for en aften. Ta ferðina vann James Sampson, og á øðrum plássi endaði Malene Mortensen, sum endaði á aftasta plássið evropeisku finaluna í Estlandi í 2002.

Síðani Stjerne for en aften hevur Tomas serliga roynt seg í bólkinum Latin Fever, sum ikki liggur so langt frá Sig det´ løgn sjangruni.

– Eg veit ikki, hvønn týdning Stjerne for en aften hevur í øllum hesum. Eg meti meg hava ment meg sum sangara og í upptraðkan síðani 2001, sigur Tomas Thordarson.

## Útgáva

Tomas kann nú byrja at gleða seg til túrin til Turkalands, har hann skal syngja ensku útgávuna av Sig det´ løgn, ið hevur fingið heitið Shame on you.

Men Tomas arbeiðir eisini í løtuni við einari útgávu í tøttum samstarvið við Ivar Greiner, sum hevur skrivað Sig det´ løgn. Plátusáttmálin er undirskrivaður, men tað er óvist nær útgávan kemur út.

Tær báðir eru ikki heilt greiðir yvir, hvønn stíl útgávan skal hava. Tomas sigur, at tað hevur størstan týdning fyri hann, at útgávan verður væl framleidd og góðskan er góð. Ivar Greiner roknar hinvegin við, at tær nú so væl dámdu salsa rútmurnar verða at hoyra aftur í fleiri av sangunum.

Sjálvur dugir Tomas ikki rættiliga at siga, hvar áhugin fyri salsa og suðurlendskum tónleiki kemur frá.

– Tað er bara nakað, eg havi tikið til mín.

Vónirnar eru góðir til altjóða kappingina í mai.

– Eg fari at gera alt, eg eri mentur, sigur ein avgjørdur og fegin Tomas.

## Christensen

Sum navnið kanska eisini gevur ábendingar um, so er Tomas hálvur íslendingur. Pápi hansara er íslendingur. Hann hevur fyri fáum árum síðani fingið samband við sín hálvbeiggja sín og íslendska partin av familjuni. Undan Grand Prixnum ognaði hann sangin til íslendska beiggjan.

Men um tú ætlar tær at finna Tomas í telefonbókini, so riggar tað óivað betri at leita undir Christensen, tí tað er hansara eftirnavn. Ì sambandi við ferming sína varð hann eisini um sama mundi dóptur, og tá fekk hann íslendska millumnavnið, ið hann í Grand Prix høpi nýtir sum eftirnavn.

Tomas livir til dagligt saman við einum manni, og teir báðir forstra upp eitt barn.

## Semifinala og finala

Turkaland vann Eurovision Song Contest í fjør, og tí verður landi eisini vertur fyri kappingini í ár. Men leisturin fyri kappingina er broyttur í mun til undanfarin ár. Kappingin verður skipað við einari semifinalu 12. mai, har 22 lond – teirra millum Danmark – verða við. Tíggju tey bestu av hesum sleppa leygarkvøldið 15. mai at luttaka í sjálvari finaluna, sum er Evropeiska Melodi Grand Prixið, vit kenna frá undanfarnum árum.

Men tey tíggju londini, sum eru komin víðari, frá semifinaluni fáa tað ikki at vita fyrr enn seinnapartin hin 15., og atkvøðugreiðslan er eisini í tríggjar samfullar dagar.

## Skeivt forum



*Stig Tøfting hevði konuna við, tá tey jagstraðu autografar í Atletion leygarnáttina*

Fótbóltsspælarin Stig Tøfting fekk heiðurin at kunngera fyrsta finalistin í Melodi Grand Prix leygarkvøldið. Tað var tískil hann, sum kunngjørdi, at Petsi Tvørfoss var komin í finaluna.

Men fyrrverandi danski landsliðsleikarin helt ikki, at Melodi Grand Prix er rætta staðið fyri sangin hjá Petsi.

– Hon syngur fantastiska væl, hetta er ikki tað rætta forumið fyri ein tílíkan sang, sigur Stig Tøfting, leggur afturat, at hann helt tann rætta sangin vinna.

Plæneklipperen, sum verður Stig Tøfting verður róptur, jagstraði autografar leygarkvøldið. Til endamálið lánti hann penn og pappír frá Sosialinum. Hann eigur trý børn, og stjørnur sum Alex og Michael Learns to Rock søgdu ikki nei, tá Stig Tøfting kom at biðja um teirra undirskrift - til børnini.

## Eingin Grand Prix fan



*Pia, alias Mia Lyhne, er í veruleikanum als ikki nakar Grand Prix fan*

Mia Lyhne hevði leygarkvøldið ein serstakan leiklut í Melodi Grand Prix. Hon spældi leiklutin sum Pia, Grand Prix fan ella fanatikari. Pia hevði eitt sítt dreymastarv við at gera samrøður við luttakararnar, men sjálv er Mia eingin Grand Prix fan.

– Heilt erligt. Eg leggi ikki so nógv í Grand Prix, men eg havi hugt at tí. Og mín yndissangur er Hallelujah (Ísrael 1979, blðm), sigur Mia.

Mia arbeiðir til dagligt sum sjónleiki. Fyri tveimum vikum síðani varð hon spurd, um hon hevði hug at vera í Melodi Grand Prix, og hon sigur seg bara vera væl nøgda við úrslitið. Og ógvuliga passandi við eina samrøðu við eitt føroyskt blað, kunnu vit avdúka hennara yndissang leygarkvøldið.

– Mín favorittur var Petsi, og tað segði eg eisini við hana, sigur Mia Lyhne.